Álit

í

løgtingsmáli nr. 12/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum (Kravið um nýtt felag til hvørja einstaka framleiðslu verður strikað, og Filmshúsinum verður álagt at lata landsstýrismanninum frágreiðing frá virkseminum farna árið)

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgni Hoydal, hevur lagt málið fram 19. september 2023, og eftir 1. viðgerð tann 21. september 2023 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 4. oktober 2023.

Undir viðgerðini av løgtingsmáli nr. 95/2022 í vár (Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum (Broyttur fíggingarleistur og lógartøkniligar rættingar)) upplýsti landsstýrismaðurin fyri Vinnunevndini, at ætlanin var at koma við eini broyting í heyst, har tey ynsktu at strika kravið um, at allar verkætlanir/framleiðslur skuldu leggjast í sjálvstøðug partafeløg.

Vinnunevndin er samd í, at henda ásetingin er umsitingarliga tung og óneyðug, og fleiri hoyringarpartar vísa á júst tað sama.

Harafturat ynskti Vinnunevndin at fáa við í lógina, at álagt verður Filmshúsinum at gera eina frágreiðing til landsstýrismannin í seinasta lagi 1. februar á hvørjum ári, har greitt verður frá virkseminum undanfarna árið við serligum atliti at tí virksemi, sum lógin um afturbering hevur við sær.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 17. oktober 2023

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstformaður	Eyðdis Hartmann Niclasen
Jørgen Niclasen	Árni Skaale	Uni Holm Johannesen
	Karlot Hergeirsson	